Álit

í

løgtingsmáli nr. 97/2020: Uppskot til løgtingslóg um Búskaparráð

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð 10. mars 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. og 25. mars og 8. og 15. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Búskaparráðið, Landsbankan, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Kommunufelagið, Vinnuhúsið, Fakfelagssamstarvið, Fróðskaparsetrið og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Aksel V. Johannesen, Páll á Reynatúgvu, Ruth Vang og Jógvan Skorheim) hevur hesar viðmerkingar:

Hóast landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt uppskotini fram *(løgtingsmál nr. 97/2020 og 98/2020)*, so hevur løgmaður boðað frá, at hetta fyrst og fremst er eitt ynski hjá honum persónliga og Sambandsflokkinum. Hetta tí løgmaður heldur, at Landsbankin ikki hevur nakra veruliga uppgávu uttan at ringja til Nordea av og á.

Løgmaður hevur eftir øllum at døma ikki sett seg nóg væl inn í arbeiðið hjá Landsbankanum. Landsbankin hevur eina røð av uppgávum, m.a. skuldar- og gjaldførisrøkt landsins, at fáa til vegar lyklatøl um føroyska búskapin, at ráðgeva politisku skipanini, kredittmeting, at umsita Samhaldsfasta og at hava eftirlit við serligum váðum í føroyska búskapinum, serliga innan fíggjargeiran. Hetta kann í serligum føri viðføra ein beinleiðis ella óbeinleiðis kritikk av politisku skipanini.

Landsbankin skal tryggja, at vit hava eitt sterkt eftirlit og góða og óhefta ráðgeving, tá tað kemur til fíggjar- og búskaparviðurskifti.

Búskaparráðið hevur til uppgávu at gera óheftar metingar av búskapinum; at vísa á gongdina í búskapinum, avbjóðingar, vansar og møguleikar. Hetta kann hava við sær ein beinleiðis ella óbeinleiðis kritikk av politisku skipanini.

Nevndin hjá Landsbankanum hevur serskildar og krevjandi uppgávur, ið eru so mikið ymiskar frá endamálinum hjá Búskaparráðnum, at talan á ongan hátt er um samanfall av uppgávum. Meirilutin heldur tí als ikki, at sparingin - sum í mesta lagi er 300-400 tús. kr. árliga - við at leggja Landsbankan og Búskaparráðið saman á nakran hátt stendur mát við tann førleikamiss, sum broytingin elvir til.

Uppgávurnar hjá Landsbankanum og Búskaparráðnum kunnu onkuntíð vera beinleiðis í stríð við hvørja aðra. Eru veikleikar í føroyska búskapinum, er tað skyldan hjá Búskaparráðnum at vísa á hesar og rópa varskó. Ein av uppgávunum hjá Landsbankanum er at selja lánsbrøv vegna

landskassan. At selja lánsbrøv fyri landskassan er nøkulunda tað sama sum at selja føroyska búskapin. Við samanleggingini skal nú ein og sami stovnur kritisera búskapin og samstundis selja hendan fyri møguligum íleggjarum ella keyparum av lánsbrøvum hjá landskassanum. Hetta virkar stak illa umhugsað.

Skal álit vera á Landsbankanum og Búskaparráðnum hevur óheftni stóran týdning. Landsbankin hevur fram til nú virkað óheftur av politisku skipanini. Eitt nú hevur Landsbankin ongantíð verið á fíggjarlógini, til tess at hann ikki skal vera bundin av játtan frá politisku skipanini. Við uppskotinum hjá landsstýrismanninum verður hetta nú broytt. Landsbankin kemur á fíggjarlógina og verður bundin av játtan og tí eisini vælvild frá landsstýri og Løgtingi. Meirilutin heldur tað vera týdningarmikið, at tað ikki kunnu reisast spurningar um óheftni hjá Landsbankanum og Búskaparráðnum. Men við hesi lógarbroytingini fara tað tíverri frameftir at kunna verða settir spurningar við óheftnið.

Øll hoyringarskrivini eru ímóti ætlaðu broytingunum hjá landsstýrinum, og øll, sum hava verið til hoyringar í Fíggjarnevndini, eru ímóti broytingunum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen og Bill Justinussen) vísir á, at samgongan hevur sett sær fyri at minka talið av nevndum og ráðum, og at rationalisera almennu fyrisitingina. Fíggjarmálaráðið endurskoðar ráð og nevndir sínar, fyri at minka og avtaka nakrar teirra. Til dømis er Fíggingargrunnurin í løtuni undir avtøku. Ætlanin er eisini at avtaka aðrar nevndir og ráð.

Í hesum málinum verður mælt til, at landsbankanevndin verður Búskaparráðið, og at Landsbankin røkir skrivarauppgávuna, og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum. Nú landsbankanevndin eisini verður Búskaparráð, minkar fyrisitingin við einum ráði. Tvær nevndir við tilsamans 10 nevndarlimum, verður til eina nevnd við 5 nevndarlimum.

Fróðskaparsetrið røkir dagligu umsitingina og skrivarauppgávuna hjá Búskaparráðnum. Nú umsitingin og skrivarauppgávan verður flutt til Landsbankan at røkja, ber til at rationalisera fyrisitingina, og sakkunnleikin verður savnaður á einum stað.

Minnilutin vil eisini vísa á, at endamálið við lógaruppskotinum er at savna sakkunnleika og fyrisiting innan búskaparmál og at lækka talið á nevndum. Sigast kann, at meginbroytingin í mun til verandi lóggávu er, at landsbankanevndin verður Búskaparráð og at Landsbankin røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

Minnilutin vil eisini vísa á, at landsbankanevndin verður vald á sama hátt, sum Búskaparráðið higartil er valt, har landsstýrismaðurin setir Búskaparráðið eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Tó soleiðis at landsbankanevndin/Búskaparráðið hevur fimm limir, har í minsta lagi tríggir skulu vera búskaparfrøðingar.

Minnilutin heldur tað vera skilagóðar broytingar, sum lógaruppskotið leggur upp til. Serliga hetta at savna sakkunnleika og fyrisiting innan búskaparmál á einum stað, tað er skilagott.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 22. apríl 2021

Magnus Rasmussen
formaður

Aksel V. Johannesen
næstformaður

Jákup Mikkelsen

Bill Justinussen

Jógvan Skorheim

Páll á Reynatúgvu

Ruth Vang